Dagførd: 20-06-2025 (Ver. 2)

# Reglugerð um lendisskrá

Við heimild í §4 í kunngerð nr. 122 um lendisskrá frá 22. november 2023.

Grundarlag fyri reglugerðini:
Lendisskráin er ein almenn skrá sum vísir galdandi og ætlaðar byggisamtyktir og tilhoyrandi ásetingar. Skráin verður umsitin av Umhvørvisstovuni (US).

Sambært kunngerð um lendisskrá er ásett í §1.: at *í lendisskránni eru skrásettar allar góðkendar byggisamtyktir* og at *lendisskráin skal vísa øll byggisamtyktini viðkomandi kort og tekstskjøl.* Stk. 2. í § 1. ásetur at ætlaðar byggisamtyktir ella broytingar í byggisamtyktum skulu vísast í lendisskránni í seinasta lagi dagin eftir at ætlanin ella broytingin er lýst.

Í seinasta lagi 4 vikur eftir at landsstýrisfólkið hevur góðkent byggisamtyktir skulu hesar vísast í lendisskránni (§3 stk. 1.).

Sambært §3 stk. 2. skal kommunan, sama dag sum hon kunnger ætlaða byggisamtykt ella broyting í byggisamtykt, boða Umhvørvisstovuni frá hesum, á tann hátt sum Umhvørvisstovan ásetur sbrt. §4.

Skráseting í Lendisskránni av ætlaðari byggisamtykt og broyting í byggisamtykt:

Kommunan skal skipa fyri, at ætlaðar og galdandi byggisamtyktir, við tilhoyrandi skjølum, eru tøkar sum GIS vevtænanstur. Hetta merkir, at kommunan skal seta eina GIS vevtænastu upp, antin sjálv ella við hjálp frá einum veitara. Síðani setur US eina koyring upp, ið sjálvvirkandi heintar byggisamtyktirnar dagliga frá kommununi. Á tann hátt eru byggisamtyktirnar altíð dagførdar á Kortal ella í øðrum kaga hjá US.

Tað er av stórum týdningi, at eitt øki **ongantíð** verður strikað, men at ein dagfesting ístaðin verður sett í teigin *endað*, soleiðis at tað søguliga (historikkurin) kann fáast við.

Eisini er av stórum týdningi, at kommunan skrásetir neyðugu dagfestingarnar/upplýsingar, ið komið verður nærri inná á næstu síðu.

**1. Snið/format**

US skal hava allar byggisamtyktir umvegis eina GIS vevtænastu frá kommununi.

Vevtænastan skal innihalda hesar upplýsingar fyri hvørja áseting í byggisamtyktini:

| | |
|---|---|
| **markatalsnr.** | DØMI: 55 (sum er markatalsbygdin Tórshavn) |
| **kommununr.** | DØMI: 29 (sum er Tórshavnar kommuna) |
| **heiti á øki** | DØMI: Bústaðarbygging ella Serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga |
| **øki (stytt)** *) | DØMI: A1 ella bara A, um kommunan ikki brúkar tøl sum undirbólkar |
| **leinki til áseting** | Leinki til kommunala áseting fyri økið |
| **leinki til góðkenning** | Leinki til góðkenning av byggisamtyktini/ásetingini hjá landstýrisfólkinum |
| **støða** | Í gildi; til hoyringar/viðgerð; partvís góðkend; noktað |
| **hoyring byrjað** | Dagfesting fyri, nær ásetingin er farin til hoyringar |
| **hoyring endað** | Dagfesting fyri, nær hoyringarfreistin er farin |
| **gildiskoma** | Dagfesting fyri, nær ásetingin er komin í gildið |
| **endað** | Dagfesting fyri, nær ásetingin er endað |
| **almenn viðmerking** | |
| **leinki til hoyring** | Leinki til heimasíðu hjá kommunu sum vísir hoyring fyri økið, um slík er tøk |
| **øki til hoyringar** | 1: økið broytir áseting. *NULL*: økið broytir ikki áseting. Hetta merkir, at um ein partur av einum øki ætlandi broytir áseting, verður "1" sett í henda partin meðan *NULL* kemur at standa í óbroytta partinum. |

*) bert galdandi fyri almennar byggisamtyktir

**2. Mannagongd**

Sum áður nevnt, so skal eitt øki **ongantíð** strikast, men ístaðin endast. Um skapið á einum øki broytist, skal gamla økið IKKI broytast, men ístaðin endast við at seta eina dagfesting í teigin *endað*. Nýtt øki skal síðani teknast og røttu teigar útfyllast.

Um skapið á einum øki ikki broytist, men einans ásetingar í talvuni verða broyttar, skal nýtt øki eisini teknast, og gamla økið endast.

Ymiskt er, hvørjir teigar skulu útfyllast, alt eftir, um talan er um eina broyting, sum er farin út til hoyringar (sí 3. Ætlaðar broytingar), ella um talan er um eina broyting, sum er góðkend av landsstýrisfólkinum (sí 4. Ígildiskoma).

**3. Ætlaðar broytingar**

Tá kommunan lýsir ætlaða broyting í kunngerð, skal teigurin *støða* ásetast til "til hoyringar/viðgerð", og dagfesting setast í teigin *hoyring byrjað* og *hoyring endað*. Haraftrat skal teigurin *øki til hoyringar* setast til *"1"* um áseting fyri økið broytist. Hesir teigar skulu fyllast út:

- markatalsnr.
- kommununr.
- heiti á øki
- øki (stytt) – um talan er um almenna byggisamtykt
- leinki til áseting
- støða
- hoyring byrjað
- hoyring endað
- leinki til hoyring – um kommunan til dømis vísir hoyringina á síni heimasíðu
- øki til hoyringar

**4. Ígildiskoma**

Tá hoyringsfreistin er farin, og broytingin er góðkend av landsstýrisfólkinum, broytir kommunan teigin *støða* til "í gildi" og setir dagfesting í teigin *gildiskoma*. Eisini skal leinki til góðkenningina frá landsstýrisfólkinum setast í teigin *leinki til góðkenning*. Økið frammanundan broytingina verður enda-dagfest.

**5. Broyting ikki góðkend**

Um broytingin ikki verður góðkend av landsstýrisfólkinum, broytir kommunan teigin *støða* til "noktað" og innsetur dagfesting í teigin *endað*. Økið hvørvur tá í kaganum hjá US.

**6. Broyting partvís góðkend**

Um broytingin verður partvís góðkend av landsstýrisfólkinum, broytir kommunan *støða* til "partvís góðkend" og setir dagfesting í teigin *endað*. Hetta verður tá ikki víst í kaganum hjá US. Síðani skal kommunan:

- tekna góðkenda partin
- rætta tekstin um neyðugt
- broyta teigin *støða* til "í gildi"
- dagfesta *gildiskomu*
- áseta leinki til partvísu góðkenningina frá landstýrisfólkinum í teigin *leinki til góðkenningina*

**7. Serstakar byggisamtyktir (verandi)**[1]

Umhvørvisstovan skal eisini hava serstøku byggisamtyktirnar, um kommunan hevur slíkar. Hetta skal gerast sum ein vevtænasta fyri seg, soleiðis at kommunan hevur eina vevtænastu fyri almennar byggisamtyktir og eina fyri serstakar byggisamtyktir.

Eins og við teimum almennu byggisamtyktunum er sera týdningarmikið við dagfestingum í teigunum *hoyring byrjað*, *hoyring endað*, *ígildiskoma* og *endað*, og at hesir verða nýttir sum fyriskrivað undir punktunum 3-6. Aðrir teigar kunnu tó eisini vera týdningarmiklir.

[1] Umhvørvismálaráðið góðkennir ikki longur heiti ella formatið "serstøk byggisamtykt". Ein kommuna hevur eina byggisamtykt (ella eina fyri hvørja bygd í kommununi), men byggisamtyktin er ein heild. Byggisamtyktin kann hava ein almennan part og harumframt ein part við serligum økisásetingum, men talan skal vera um eitt skjal.